# Handil við kristiligum bókum og fløgum

**Í dag letur upp nýggjur handil í Niels Finsensgøtu í Havn. Talan er um handilin Bethel, sum selur kristiligar bøkur, gospelfløgur og gávulutir**

HANDILSLÍV
*Birita í Dali & Mariann Mortensen*



*Stella Zachariassen letur nú egnan handil upp í Niels Finsensgøtu í Havn. Handilin, ið eitur Bethel, selur kristiligar fløgur, bøkur, gávulutir og harumframt er eisini kiosk*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í dag, leygardag, letur Stella Zachariassen ein handil upp í Niels Finsensgøtu. Handilin hevur fingið navnið Bethel, sum merkir Guds hús.

Stella Zhakariasen er frá Sri Lanka, men gift í Føroyum og hevur nú búð her í 11 ár.

Í Bethel verður mangt at fáa millum annað bøkur, nýmótans og eldri fløgur, sjónbond av til dømis Bill Gaither og gávulutir. Í handlinum er eisini ein kiosk, har ein kann keypa góðgæti og annað.

Í dag verður Svenning av Lofti í Bethel, har hann fyrstu fer selur sína egnu bók

Handilin er til øll, stór sum smá. Stella leggur stóran dent á, at handilin skal vera eitt stað, har ung kristin kunnu møtast. Stella ynskir, at handilin helst skal verða eitt stað, har tey kunnu vera seg sjálvi. Hon heldur, at tey ungu kristnu hava ov fá støð at halda til í.

– Handilin skal vera eitt stað, har ung kristin kunnu hugna sær, men øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Stella.

Fólk við trupulleikum ella sum eru á skeivari lívskós kunnu fáa hjálp inni hjá Stellu.

- Eg vil ikki royna at umvenda ein og hvønn, men bara hjálpa fólkið, leggur Stella afturat.

Um ein ynskti at keypa kristiligar fløgur ella bøkur, var fyrsti handil við hesari vøru í Runavík. Hetta hildu fólk, sum búgva longri burtur, lítið og einki um.

– Nógv saknaðu ein tílíkan handil í miðbýnum, men eingin gjørdi nakað við hetta, tí fekk eg tað hugskot, sjálv at opna ein kristnuligan handil, sigur Stella Zachariassen at enda.

# Tvey ferðsluóhapp

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Hóskvøldið vóru tvey ferðsluóhapp. Annað var um tíggjutíðina um kvøldið. Tá var tað ein bilur, sum kom úr tunlinum í Kaldbaksbotni, og skal yvirhála ein lastbil. Men tá bilurin so yvirhálar kemur ein bilur frá Kaldbaksvegnum, og hesir báðir renna saman.

Ongin fólkaskaði stóðst av samanstoytinum, tí talan var bert um materiellan skaða.

Seinni sama kvøld var eitt ferðsluóhapp á Áarvegnum í Havn. Politiið veit ikki at siga, hvussu tað er hent, men annar av bilførarunum var ávirkaður av rúsdrekka.




*Eitt ferðsluóhapp var á Áarvegnum um 00.30 tíðina hóskvøldið. Annar av bilførarunum var ávirkaður av rúsdrekka*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Altjóða dagur móti harðskapi ímóti kvinnum

**Mánadagurin 25. november er lýstur at verða altjóða dagur móti harðskapi ímóti kvinnum**

HARÐSKAPUR
*Ingrid Bjarnastein*

Kvinnuhúsið og Kvinnufelagið í Havn skipa fyri fundi á gongugøtuni í Havn mánadagin tann 25. november. Hetta kemst av, at hesin dagur er lýstur at verða altjóða dagur móti harðskapi ímóti kvinnum.

– Rætturin til eitt lív uttan harðskap er eitt krav frá kvinnum um allan heimin. Afturat at skaða og oyðileggja kvinnuna likamliga, er harðskapur ein forðing fyri, at kvinnur virkið taka lut í samfelagnum. Harðskapur rakar kvinnur um allan heim, í øllum sosialum løgum og uttan mun til útbúgving, skrivar Kvinnuhúsið í tíðindaskrivi.

ST hevur staðfest í eini yvirlýsing staðfest, at øll menniskju er frí og hava sama rætt. Tí skal miðast ímóti at forða harðskapi ímóti kvinnum – bæði alment og privat. Øll sløg av kynsligum ágangi, misnýtslu og handli av kvinnum, kynsdiskriminering í umsiting av rættarskipan og ósemjum, har kvinnur av siðvenju ella átrúnarligum umstøðum eru í vanda.

– Harðskapur ímóti kvinnum er ein forðing fyri framburði og friði. Í virkisætlan frá Bejing í 1995, staðfestir ST, at harðskapur ímóti kvinnum forðar javnstøðu millum kynini, sigur Kvinnuhúsið víðari.

Seinastu árini hava fleiri lond tikið stig til at bøta um lóggávur í sambandi við harðskapsraktar kvinnur. Nýggj svensk lóggáva revsar tann, ið keypir kynsligar veitingar. Í Eysturríki sigur lógin, at um ein maður fremur harðskap ímóti kvinnu í teirra egna heimi, so er tað maðurin, ið skal flyta úr heiminum, meðan kona og møgulig børn verða búgvandi.

– Í Føroyum setti løgtingsmaður fram spurning í Løgtinginum um striptease er lóligt. Tað er tað ikki, men onkur skal melda málið áðrenn løgvaldið tekur stig til at forbjóða striptease. Skulu broytingar fara fram krevur tað eina hugburðsbroyting. Ikki minst hjá teimum, ið umboða samfelagið. Herundir dómarar og løgreglufólk, sum gjøgnum útbúgving eiga at broyta samfelagsliga áskoðan og fatan, sigur Kvinnuhúsið at enda í tíðindaskrivi.

# Jólabússurnar hjá Frelsunarherinum

Nú eru jólabússurnar hjá Frelsunarherðinum settar í handlarnar, og tann, sum leggur pening í hesar bússur er við til at hjálpa teimum við vælgerðararbeiði.

Tað mesta av peninginum, sum kemur inn, fer til Herberg Frelsunarhersins í Niels Winthersgøtu 3. Hetta er eitt tilboð um mat, song og persónliga røkt.

Higartil í ár hava verið um 2000 yvirnáttingar. Harafturat hava umleið 2000 gjørt brúk av dagtilboðnum, har møguleiki er at fáa døgurða.

Allar matútreiðslur verða goldnar av tí peningi, sum kemur úr jólabússum og gávum.

Frelsunarherurin er ógvuliga takksamur fyri hjálpina, sum verður givin at stuðla arbeiðnum, verður sagt í tíðindaskriv.

-ib



# Freistin longd

**Trivnaðar- og heilsuráðið hevur fingið longt freistina, ráðið hevði til at lata landsstýrismanninum álit um føroyska almanna- og heilsuøkið. Tó verður ikki talan um størri játtan til ráðið**

KANNING
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Mia Pedersen, formaður í Trivnaðar- og heilsuráðnum, hevur biðið um at ráðið skal sleppa at halda fram við sínum arbeiði eftir nýggjár. Bill Justinussen, landstýrismaður, hevur játtað at leingja freistina til 30.juni, men tørvur verður tó ikki á meira pengum til ráðið*

Trivnaðar- og heilsuráðið verður ikki liðugt við sítt arbeiði í ár. Upprunaliga skuldi ráðið handa Bill Justinussen, landsstýrismanni, eitt álit við tilráðing um føroyska almanna- og heilsuverkið í seinasta lagi á nýggjárinum. Men ráðið hevur síðan staðfest, at skal arbeiðssetningurin røkkast til fulnar, so verður neyðugt við longri skotbrái. Og Bill Justinussen hevur nú gjørt av at tíðarskeiðið hjá ráðnum at arbeiða í verður longt til 30.juni næsta ár. Á fíggjarlógini í ár er ein millión játtað til ráðið, men av tí at ráðið upprunaliga skuldi vera liðugt við sítt arbeiði í seinasta lagi á nýggjárinum, eru eingin pengar settir av næsta ár. Bill Justinussen sigur, at tørvur verður ikki á meira pengum til ráðið, tí játtanin fyri í ár er ikki brúkt, og kann tí flytast til næsta ár.

Í grein eitt í lógini fyri Trivnaðar- og heilsuráðnum stendur, at uppgávan hjá ráðnum er at útgreina føroyska almanna- og heilsuverkið og gera eitt uppskot til eina langtíðarætlan fyri føroysku vælferðartænastuna. Ráðið varð sett í september í fjør, men skuldi fyrst orða ein arbeiðssetning, ið skuldi góðkennast av táverandi landsstýrismanni á almanna- og heilsumálum, og tí dróg nakað út, áðrenn ráðið av álvara slapp til arbeiðis.

Mia Pedersen, formaður í ráðnum, sigur, at higartil hevur ráðið millum annað gjørt eina spurnarkanning millum 60 almennar stovnar. Eftir er nú at gera eina brúkarakanning, ella hugburðskanning, millum føroyingar, har spurt verður, hvat fólk halda um tænastuna, tey fáa frá almanna- og heilsuverkinum. Ætlanin er at senda spurnarbløð út til umleið 1000 føroyingar.

- Endamálið er at fáa báðar partar við, bæði stovnar og brúkarar, fyri á tann hátt at geva eina mynd av, hvar er gott, og hvat kanska ikki er so gott, sigur Mia Pedersen. Hon sigur, at spurnarbløðini til brúkararnar verða send út eftir nýggjár.

Formaðurin í Trivnaðar- og heilsuráðnum sigur, at enn er tað verður ikki neyðugt at biðja um meira pengar til ráðið, hóast arbeiðið nú fer at vara eitt hálvt ár longri enn upprunaliga mett. Millum 200.000 og 300.000 krónur eru eftir av játtanini, sum ráðið fær á fíggjarlógini í ár, og ætlanin er at flyta hesar pengar til næsta ár.

Ráðið hevur skrivara í starvi fulla tíð, og hann er í starvi til 31.desember. Enn dugur Mia Pedersen ikki at siga, hvørt skrivarin fer at halda fram í starvinum eftir nýggjár.

Í lógini fyri Trivnar- og heilsuráðið stendur beinleiðis, at ráðið skal lata landsstýrismanninum eitt álit innan 31.desember í ár, og tí fer Bill Justinussen, landsstýrismaður í familju- og heilsumálum, í næstum at leggja eitt broytingaruppskot fyri løgtingið, ið skal geva ráðnum heimild til at halda fram við sínum arbeiði.

# Miðflokkurin hevði fingið tvey umboð

**Nýggjasta veljarakanningin hjá Fregnum gevur Miðflokkinum tvey umboð á løgting, meðan Sjálvstýrisflokkurin framvegis ikki røkkur uppum tinggáttina. Hálvt ár er nú síðan samgongan seinast hevði meiriluta í regluligu veljarakanningunum, ið Gallup ger fyri blaðið**

VELJARAKANNING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Miðflokkurin hevði fingið tvey umboð á løgting, um val var í dag. Tað vísir nýggjasta veljarakanningin, ið Gallup hevur gjørt fyri Fregnir.

Sambært kanningini er Sambandsflokkurin framvegis størsti flokkur og fær níggju umboð á ting. Tjóðveldisflokkurin fær átta tinglimir, Javnaðarflokkurin fær sjey, Fólkaflokkurin fær seks tinglimir, Miðflokkurin fær tvey, meðan Sjálvstýrisflokkurin sambært kanningini einki umboð hevði fingið á løgting, hevði val verið í dag.

Í mun til seinastu kanning, ið Gallup gjørdi fyri blaðið í oktober, er einasta broytingin, at Fólkaflokkurin missir ein tinglim, meðan Miðflokkurin fær ein afturat. Í prosentum gongur Fólkaflokkurin aftur úr 21,3 niður í 19 prosent, meðan undirtøkan hjá Miðflokkinum økist úr 3,8 prosentum upp í 5,2 prosent.

## Samgongan framvegis ikki meiriluta

Líka síðan valið 30.apríl hevur Gallup gjørt regluligar kanningar, einaferð um mánaðin, fyri Fregnir. Kanningarnar vísa, at samgongan, ið hevur 17 tinglimir aftanfyri seg, misti henda meiriluta, longu í juni mánað. Og síðan hevur samgongan ongantíð megnað at vinna seg uppaftur á 17 tinglimir í veljarakanningunum. Í juli og í august vístu kanningarnar, at samgongan bara hevði fingið 15 tinglimir, hevði val verið tá. Hesar báðar mánaðirnar fekk Sambandsflokkurin 10 tinglimir. Síðan hava teir fýra samgonguflokkarnir í hvørjari av mánaðarligu kanningunum í Fregnir bara fingið 16 tinglimir. Havast skal tó í huga, at hóast samgonguflokkarnir í nýggjastu veljarakanningini bara fáa 16 tinglimir, so høvdu flokkarnir fingið tilsamans 51,1 prosent av atkvøðunum, hevði val verið í dag.

# Trygdargrunnurin er nóg stórur

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur gjørt av, at inngjaldið, ið allir arbeiðsgevarar higartil hava verið noyddir at gjalda í Trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir, skal steðga. Við árslok standa útvið 70 milliónir í grunninum, og tað er nóg mikið, metir landsstýrismaðurin, sum í næstum fer at leggja uppskot fyri løgtingið**

FÍGGJARMÁL
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Karsten Hansen fer nú at strika inngjaldið, sum allir arbeiðsgevarar hava rindað í Trygdargrunnin. Broytingin fer eitt nú at spara landskassanum millum tvær og tríggjar milliónir krónur um árið*

Allir arbeiðsgevarar skulu í dag gjalda 0,15 prosent av útgoldnum lønum í serliga Trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir. Endamálið við grunninum er at tryggja arbeiðsfólki teirra løn, skuldi eitt virki farið á húsagang, og eingir pengar sostætt vóru at gjalda fólkita løn, ið tey eiga tilgóðar.

Tá útgjaldið úr grunninum var uppá tað mesta, kreppuárini miðskeiðis í nítiárunum, vóru okkurt árið goldnar á leið fimm milliónir krónur úr grunninum. Men seinnu árini hevur at kalla einki verið goldið úr grunninum, sum samtíðis hevur havt møguleika at vaksa, so tað við árslok fara at standa útvið 70 milliónir krónur í grunninum.

Í fjør vóru til dømis goldnar stívliga sjey milliónir krónur inn í Trygdargrunnin. Av samlaða inngjaldinum guldu privatu arbeiðsgevararnir tveir triðingar, meðan almenni arbeiðsgevarin, tvs. landskassin stóð fyri einum triðingi. Men grunnurin hevði eisini rentuinntøkur osv, so samanlagt vóru inntøkurnar 10 milliónir krónur.

Málið um at broyta lógina fyri Trygdargrunnin, so inngjaldið verður strikað, hevur verið fyri á landsstýrisfundi, og í næstum fer Karsten Hansen, landstýrismaður í fíggjarmálum, so at leggja málið fyri løgtingið. Fyri landskassan fer uppskotið at mekja, at spardar verða millum tvær og tríggjar milliónir krónur árliga, ið higartil eru goldnar inn í Trygdargrunnin.

Karsten Hansen sigur, at eftir hansara tykki er grunnurin í dag so mikið sterkur, at ráðiligt er at strika inngjaldið.